# Menna egnan førleika í oljuvinnuni

**Týsdagin byrjaði nýtt skeið í søgu Handilsskúlans. Henda morgunin fóru 20 næmingar te. fólk úr føroyska vinnulívinum og almennu umsitingini í skúla aftur. Talan er um eina røð av skeiðum, sum fyrst og fremst snúgva seg um heilsu, trygd og umhvørvi í eini komandi oljuvinnu.**

ÚTBÚGVING OG OLJA
*Jan Müller*



*Starvsfólk í føroyskum vinnulívi, almennari umsiting oo. Eru við á hesum fyrsta skeiðinum um heilsu, trygd og umhvørvi í oljuvinnuni*

*Mynd Jens K Vang*

Oljuvirksemið, ið nú er við at taka seg upp í Føroyum, setir stór krøv til heilsu, trygd og umhvørvi (HTU). Handilsháskúlin BI í Stavanger hevur saman við Føroya Handilsskúla tikið ímóti hesi avbjóðing og hevur gjørt eina spildurnýggja útbúgvingarætlan fyri føroyingar, sum ætla sær at arbeiða í eini komandi oljuvinnu. Henda útbúgvingarskrá, sum er í fimm modulum, har hvørt er uppá 40 tímar, er ætlað øllum teimum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis koma í samband við nýggju lóggávuna, sum er gjørd til at varða um HTU í sambandi við leitivirksemi á føroyska landgrunninum. Skráin er tó serliga ætlað teimum, sum arbeiða ella ætla at arbeiða hjá oljufeløgunum ella veitarum undir teimum.

Týsmorgunin fóru so 20 fólk seg aftur á skúlabonk, hesaferð á Hotel Føroyum. Hetta er so fyrsta av fimm modulum, sum verða hildin í fimm umførum til út í oktober mánað.

Ragnar Magnussen, stjóri á Føroya Handilsskúla er sera fegin um nýggja tiltakið, sum hann vónar fer at økja um áhugan fyri skúlanum. At tey fara at hækka støðið á skúlanum er eingin ivi um og fer tað at geva honum heitið sum handilsháskúli.

Ragnar Magnussen sigur, at hetta skeiðið er so bert ein byrjan. Tað er ynski skúlans at kunna gera uppaftur meira í framtíðini á vinnuøkinum og vísir hann á, at millum krøvini, sum fara at verða sett øllum føroyskum fyritøkum, sum ynskja at gerast veitarar til oljuvinnuna er roknskapur, bygnaður, góðska og sum tað kanska mest týdningarmikla HTU, sum stendur fyri heilsu, trygd og umhvørvi. Øll virki, sum ætla sær at vera við í vinnuni, skulu hava eina HTU skipan. Skeið í hesum verður so eisini kravt av øllum, sum skulu arbeiða hjá oljufeløgunum.

– Vit eru so í ferð við at fáa henda førleika inn í føroyskt vinnulív og umsiting, sum fer at hava nakað við hesa vinnu at gera, og vit halda, at tað er rætt, at vit sum skúli eisini eru við í hesum, sigur Ragnar Magnussen, sum vísir til tað frálíka samstarvið tey hava fingið við Handilsháskúlan í Stavanger. Har hava tey arbeitt við hesum, síðani oljuvinnan kom til Noregs.

Skeiðið, sum byrjaði týsdagin, er tað fyrsta av fimm modulum. Tað snýr seg m.a. um at kunna seg við lóggávuna á umrøddu økjum, og alt tað, sum har til hoyrir. Eitt, sum eisini hevur stóran týdning á slíkum skeiðum, sigur handilsskúlastjórin, er at fáa fólk, sum skulu arbeiða í oljuvinnuni, beinleiðis ella óbeinleiðis, at hava tann rætta hugburðin. -Tá man arbeiðir innan oljuvinnuna roknar man við eins og í flogferðsluni, at eingi mistøk verða gjørd. Koma mistøk fyri fáa tey álvarsligar fylgjur. Tað er tað man roynir at sleppa undan.

Skeiðini kunnu so eisini verða ein partur av eini Bachelor of Management útbúgving. Hesi fimm skeiðini (modulini) koma at telja ein sættapart av eini slíkari útbúgving.

Fólkini, sum hava teknað seg til skeiðið koma frá ymsum fyritøkum so sum skipafeløgum og almennum stovnum. Talan er um arbeiðsfólk, sjófólk, sakførarar, kemiídnaðarfólk, fólk frá Oljumálastýrinum og Mentamálastýrinum, landssjúkrahúsinum osfr. Ragnar Magnussen heldur hetta er ein góð samanblanding og hava tey rakt teir bólkar, sum ætlanin var, men hann heldur talið kundi verið størri. Hann hevði kanska roknað við 30 luttakarunum.

Ragnar Magnussen sigur, at tað er umráðandi, at føroyingar, sum koma at arbeiða í oljuvinnuni fara við á slík skeið, ikki minst nú tey eru so bílig, nú Statoil sponsorerar tey. Statoil letur 1,5 mill. kr. til skeiðini komandi 3 árini. Harumframt skulu luttakararnir sjálvir gjalda 500 kr. fyri hvørt av modulunum. Hetta er fyri mat og innivist. So skeiðini sum so eru mestsum ókeypis.

Tríggir av teimum fimm undirvísarunum koma úr Noregi, men ætlanin er, at øll undirvísingin skal verða á føroyskum hondum sum frálíðir.

– Tað er eingin loyna, at vit við slíkum tiltaki ætla, at Handilsskúlin skal koma upp á eitt handilsháskúlastøði. Tað vil siga, at vit kunnu undirvísa á Bachelorstøði. Í dag er tann hægsta útbúgvingin tú kanst taka á skúlanum 1. partur av HD.

Sosialurin skilur, at hetta, sum Handilsskúlin hevur tikið stig til, er bert ein partur av eini røð av skeiðum og tilboðum, sum fara at verða boðin út av føroyskum undirvísingarstovnum komandi árini. Her koma eisini teknisku skúlarnir, sjómanskúlarnir, Fróðskaparsetrið oa. inn í myndina.



*Nøkur av teimum, sum hava tikið stig til umrøddu skeið: Claus Reistrup frá almennu útbúgvingarskipanini og Ragnar Magussen, stjóri á Handilsskúlanum her saman við tveimum av norsku stigtakarunum Ingvil Josdal frá Handilsháskúlanum í Stavanger og Sigmund Rosnes, sum er knýttur at verkætlanum hjá norska skúlanum*

*Mynd Jens K Vang*



## Tvingsilssøla

Hósdagin 19. apríl 2001, kl. 9.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingilssøla yvir ognina matr. nr. 89 c, Sumba (AS nr. 3/2001).

Sambært tingbókini er økið á matr. nr. 89 c, Sumba til støddar 1676 m². Húsini eru í 3 hæddum, klædd við timbri og takið er úr aluminium. Grundin er lagað upp av gróti, og sambært eigaranum er grundin umleið 100 ára gomul. Húsini vórðu rivin niður og bygd uppaftur av nýggjum í 1992. Í havanum er ein hjallur.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Kjallari: Í kjallaranum er oljufýr og oljutangi.
Miðhædd: Gongd við trappu upp á loftið, 1 wc/bað, køkur v/ altan og stova.
Loftshædd: Gongd og 4 kømur.

Tvingilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4381601), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 27.3.2001*



Tær nýggjastu sólirnar í miðbýnum í Havn

Kom og royn tað nýggjasta innan sólir í Føroyum

Ergoline



5 minuttir fyri einans 10 kr.

hjá Ásu
Niels Finsensgøta 30
Tlf. 316077

Cambridge SoundWorks
PlayWorks
PS2000 Digital



Tað besta ljóðið til PlayStation 2

Uppliv flott Surround ljóð, tá tú spælir við PS2. Kann eisini brúkast til DVD og PC-ara. Dolby Digital Decoder Amplifier innbygdur. Optiskur kaðal fylgir við. **Kr. 2.165,-**

CREATIVE
3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo



Stóra bringu
-ella lítla?

Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?

Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri
lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

Nýggj høli



Vit flyta niðurundir, í sama bygningi
»sama inngongd sum Radioverkstaðurin«

Húðrøktarstovan
BEAUTY LINE
v/ Elin Madsen
N. Finsensgøta 16,kj • 100 Tórshavn • Tel. 320 321

PS2
PlayStation.2
- við hópin av møguleikum



PS2-SPØL
CD
DVD
PSone-SPØL

Nýggja undirhaldsmaskinan kann, umframt at spæla PS2-spøl við ótrúligum grafikki og ferð, eisini spæla PS one spøl, CD-arar og DVD-filmar.

Kr. 4.990,-

- kom inn og hoyr nærri

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo

SK
Felagið fyri Skrivstovu-kramba- og teknisk starvsfólk

Upplýsir um:
-sáttmálan
-starvsmannalógina
-frítíðarlógina o.a.

Gerist limir - so standa vit sterkari!

Tlf 316837 og 216837
Traðarvegur 20
Boks 1378
110 Tórshavn
skfelag@post.olivant.fo

Opið er soleiðis:
Mánadag - fríggjadag
9.00 - 12.00
13.00 - 16.00

Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.



Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Sosialurin

Tel• 21 13 12 • 31 63 00
Høvuðsreingerð frá A til Z
Teppi-, møbla- og persiennureins. Gólvviðgerð, gardinvask, vaskarí service o.m.a. til
Virkir, stovnar, privat, fyritøkur og skip
Vaskarí & Reingering
Tel• 21 13 12 • 31 63 00

Nýtt hugfar
Ungdómsráðstevna á Háskúlanum
31. mars
FØROYA UNGDÓMSRÁÐ FUR
Torir tú?
www.fur.fo